FISKIVINNU- OG SAMFERÐSLUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

14. oktober 2024
Mál: 24/23010-2
(at tilskila í svari)

Tygara skriv: 52-035/2024

Svar til skrivligan fyrispurning nr. 52-035/2024 frá Bjarna Hammer, løgtingsmanni, settur landsstýrismanninum í fiskivinnu- og samferðslumálum, Dennis Holm, um Landsverk og frágreiðingina frá SWECO um trygdina í Suðuroyartunlinum

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hevur landsstýrismaðurin givið Landsverki boð um ella loyvi til at bíleggja frágreiðingina frá SWECO?

2. Visti landsstýrismaðurin av, at Landsverk var farið aktivt inn á annað málsøki?

3. Nær bleiv frágreiðingin bíløgd?

4. Nær fingu løgmaður og P/F Suðuroyartunnilin avrit av frágreiðingini?

5. Hvat kostaði frágreiðingin frá SWECO, og hvør hevur góðkent rokningina?

Svar:

Tað er sera umráðandi at fyrireika og lýsa málið um ein Suðuroyartunnil neyvt, áðrenn farið verður undir eina so stóra verkætlan, harímillum at trygdin er í lagi bæði í byggitíðarskeiðinum og í endaliga tunlinum.

Landsverk hevur arbeitt við forkanningum og fyrireikingum til Suðuroyartunnilin í 2020, 2021 og 2022, og hevur í hesum sambandi fingið til vega frágreiðingar, ið lýsa nýggju Suðuroyarleiðina. Til dømis um linjuføringar og jarðfrøði, og Landsverk hevur gjørt eina størri frágreiðing við denti á fíggjarliga,- búskaparliga, - og umhvørvisliga partin.

Sum part av fyrireikingunum og sum vegamyndugleiki bað Landsverk ráðgevarafyritøkuna SWECO gera tvær trygdarkanningar av Suðuroyartunlinum. Eina váðakanning í samband við møguligan eld í Suðuroyartunlinum og eina kanning um møguligan bruna í byggitíðini.

Frágreiðingarnar vóru lidnar ávikavist í apríl og mai 2022. Allar frágreiðingar og kanningar hjá Landsverki eru almennar og liggja á heimasíðu stovnsins.

SWECO er millum tær størstu ráðgevarafyritøkurnar í Evropa. Eins og Norconsult, sum hevur gjørt trygdarkanningina hjá Tunnilsfelagnum, hevur SWECO drúgvar royndir innan tunnilsgerð. SWECO hevur verið partur av fleiri tunnilsverkætlanum í Føroyum, og hevur til dømis gjørt uppgávur fyri P/F Norðoyartunnilin og P/F Vágatunnilin, og fyri Landsverk, eitt nú prosjekterað Hovstunnilin.

Síðan málsøkið undirsjóvartunlar varð flutt Løgmansskrivstovuni, hevur Landsverk í ávísan mun verið við í arbeiðinum at fyrireika ein Suðuroyartunnil. Landsverk hevur luttikið í arbeiðsbólkum saman við Tunnilsfelagnum um linjuføringar, tunnilsgrót og trygd í tunlum.

Landsverk hevur eisini eftir áheitan frá Løgmansskrivstovuni eftirkannað ymiskt tilfar frá P/F Suðuroyartunlinum, sum verður brúkt til at fyrireika verkætlanina.

Landsverk og Tunnilsfelagið hava havt tveir fundir í arbeiðsbólkinum um trygd í Suðuroyartunlinum. Á fyrra fundinum vísti Landsverk til frágreiðingina hjá SWECO. Á seinna fundinum, sum var síðst í 2023, fekk Landsverk frágreiðingina frá Norconsult, sum Tunnilsfelagið hevði bílagt.

Frágreiðingarnar vóru rættiliga ólíkar. Landsverk metti, at frágreiðingin hjá Norconsult ikki í nóg stóran mun tók hædd fyri, at Suðuroyartunnilin verður so langur. Um ársskiftið bað Landsverk tí SWECO um at meta um frágreiðingina hjá Norconsult. Landsverk fekk frágreiðingina frá SWECO í mars 2024.

Ætlanin hjá Landsverki var, at frágreiðingin frá SWECO skuldi vera eitt stig á leiðini til at fyrireika stovnin til myndugleikauppgávuna við trygd í tunlinum.

Landsverk hevur goldið trygdarfrágreiðingina frá SWECO. Frágreiðingin kostaði 165 tús. kr.

Frágreiðingin frá SWECO varð handað Løgmansskrivstovuni 30. august í 2024 eftir umbøn frá Løgmansskrivstovuni. Landsverk hevur greitt frá, at á fundum við Løgmansskrivstovuna, har Tunnilsfelagið eisini var við, hevur stovnurin kunnað um frágreiðingina.

Í løgtingslógunum um verandi undirsjóvartunlar stendur, at:

"*Landsverk skal undir ábyrgd mótvegis landsstýrismanninum góðkenna tunnilsverkætlanirnar, herundir vegagerð og tunnilsgerð, áðrenn tunnilsarbeiðini verða sett í verk, og skipar í hesum sambandi fyri eftirliti við, at verkætlanirnar verða framdar samsvarandi góðkendu ætlanunum.*".

Landsstýrismaðurin heldur tað vera ein natúrligan part av fyrireikingunum at fáa til vega trygdarkanningina, tá Landsverk skal góðkenna tunnilsverkætlanir og vegagerðir, áðrenn arbeiðið fer í gongd.

Landsstýrismaðurin fegnast um, at tað tykist vera breið politiskt undirtøka fyri at fara undir ein Suðuroyartunnil. Tá Suðuroyartunnilin er gjørdur, verða 99,2% av Føroya fólki knýtt saman í einum vegakervi.

Dennis Holm
landsstýrismaður